## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 ohg 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av eystri, um kvøldið upp í stívt andøvsgul av suðri. Yvirhøvur turt og sólglotttar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í stívt andøvsgul av landsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Hybrid-bilurin vitjaði í Klaksvík

UMHVØRVI

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




Umhvørvisstovan skipar í hesum døgum fyri kunningarátaki fyri kommunalu fyrisitingunum. Í gjár varð vitjað hjá Klaksvíkar kommunu, har umboð fyri Hvannasunds, Viðareiðis, Kunoyar, Fugloyar og Húsa kommunur eisini vóru við.

Fitt av samskifti er við aðrar myndugleikar, tá ið broytingar verða gjørdar í matriklinum.

Kommunurnnar leiklutur í hesum høpi er rættiliga týdningarmikil, og tí fer Umhvørvisstovan sum matrikulmyndugleiki tí at tosa við kommunurnar um matrikularbeiðið og serliga broyttu lóggávuna á økinum.

Matrikullógin er nýliga dagførd, og hon varð broytt á avgerandi økjum. M. a. eru broytingar gjørdar í mun til lóg um landsjørð, so til ber at býta frá rakstrarbygningar á festijørð, og lættar eru gjørdar viðvíkjandi uppbýti av privatari jørð. Greitt verður frá broytta lógargrundarlagnum.

Broytingar í matriklinum eru tætt tengdar at kommunalari økisskipan eftir býarskipanarlógini og gjøldini fyri matrikulmál eru hækkað.

Lagt verður eftir hvussu kommunala viðgerðin kann hjálpa til eina so smidliga og lagaliga málsviðgerð, sum gjørligt.

Og sjálvandi mætti Umhvørvisstovan upp til kunningarvitjanini í býráðshøllini í Klaksvík í heilt serliga umhvørvisvinarligum Hybrid-bili, sigur Dávur Winther, mentanarleiðari hjá Klaksvíkar kommunu.

Kunningarferðin hjá Umhvørvisstovuni heldur fram í vikuni í Fuglafirði, Runavík, Vágunum, Tórshavn og í Suðuroy.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | --- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 14 |
| Madrid | -- |
| Róm | -- |
| Malorca | -- |
| Athen | 23 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðsti nátt:**
Eitt lágtrýst, 970 hPa. í útsynning úr Føroyum fer spakuliga eystureftir. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.

**Komandi nátt:**
Djúpa lágtrýstið skamt sunnan fyri Føroyar stendur mestsum í stað og grynnist sum frálíður.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/11 kl. $06^{00}$ – 2/11 $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,1°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/11 kl. $06^{00}$ – 2/11 $06^{00}$.
Avfallið higartil í oktober: 0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

25. oktober Mánin longst frá jørðini
2. november Fullmáni
7. november Mánin næstur jørðini
9. november Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3.nov | 06:17 | 18:42 | 05:17 | 17:42 | 05:32 | 17:57 | 08:17 | 20:42 | 09:17 | 21:42 | 04:32 | 16:57 | 03:32 | 15:57 | 06:32 | 18:57 | 07:32 | 19:57 | 06:02 | 18:27 | 07:17 | 19:42 |
| 4.nov | 07:08 | 19:35 | 06:08 | 18:35 | 06:23 | 18:50 | 09:08 | 21:35 | 10:08 | 22:35 | 05:23 | 17:50 | 04:23 | 16:50 | 07:23 | 19:50 | 08:23 | 20:50 | 06:53 | 19:20 | 08:08 | 20:35 |
| 5.nov | 08:03 | 20:31 | 07:03 | 19:31 | 07:18 | 19:46 | 10:03 | 22:31 | 11:03 | 23:31 | 06:18 | 18:46 | 05:18 | 17:46 | 08:18 | 20:46 | 09:18 | 21:46 | 07:48 | 20:16 | 09:03 | 21:31 |
| 6.nov | 08:59 | 21:26 | 07:59 | 20:26 | 08:14 | 20:41 | 10:59 | 23:26 | 11:59 | - | 07:14 | 19:41 | 06:14 | 18:41 | 09:14 | 21:41 | 10:14 | 22:41 | 08:44 | 21:11 | 09:59 | 22:26 |
| 7.nov | 09:54 | 22:22 | 08:54 | 21:22 | 09:09 | 21:37 | 11:54 | - | 00:26 | 12:54 | 08:09 | 20:37 | 07:09 | 19:37 | 10:09 | 22:37 | 11:09 | 23:37 | 09:39 | 22:07 | 10:54 | 23:22 |




